

# DEMENSKLINIKKIN

## KANNINGAR FYRI DEMENS
## ÚTGREINAN OG VIÐGERÐARMØGULEIKAR

SJÚKRAHÚS
VERKIÐ

Innihaldið í hesum faldaranum
er dagført 18/09/24

## Demensklinikkin

Demensklinikkin er ein partur av Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum. Í toyminum eru millum annað psykiatari, neuropsykologur og landsdemenssamskiparar.

### Fá eina viðtalutíð

Tá varhugi er um demens,
er fyrsta stigið at fara til kommunulæknan.

Um kommunulæknin metir, at tekin kunnu vera um demens, kann hann senda viðkomandi víðari til Demensklinikkina á Landssjúkrahúsinum.

Tað er har, borgarar í Føroyum verða útgreinaðir fyri demens.

### Útgreining

Ein útgreining fyri demens á Demensklinikkini á LS gongur vanliga fyri seg yvir eitt tíðarskeið, har fleiri viðtalur eru.

Fyrsta viðtalan er ein forkanning, har lækni og sjúkrarøktarfrøðingur spyrja um sjúkueyðkenni og sjúkusøgu.

Læknin fremur eisini eina objektiva kanning fyri at fáa greiðu á, hvussu sjúklingurin megnar einfaldar uppgávur, og spyr um minnið hjá sjúklinginum og virkisførið í gerandisdegnum. Forkanningin kann varða upp til 3 tímar.

Avvarðandi hava eisini ein týðandi leiklut í mun til at fáa eina fullfíggjaða fatan av støðuni. Tá persónurin, har illgruni er um demens, hevur veitt samtykki, verða avvarðandi spurd um hvørjar støður, tey hava eygleitt, ið kunnu vera møgulig tekin um demenssjúku.

**Endamálið við Demensklinikkini**

Endamálið er at veita útgreinan fyri demens

At finna/útiloka aðrar sjúkur, sum kunnu føra til demens

Kunna fólk og avvarðandi um fyribyrgjan fyri demens

Ráðgeva starvsfólk og avvarðandi

**Vit gera**

Likamligar kanningar

Ymsar mentalar kanningar

Samskifta við viðskiftafólk

Samskifta við avvarðandi

Samskifta við starvsfólk

Bjóða viðgerðartilboð

Vísa á onnur viðgerðartilboð

Vísa á møguleikar í samfelagnum

**Hvussu kemur tú í samband við okkum?**

Vend tær til tín kommunulækna, ið kann ávísa til okkara

Tá vit hava móttikið ávísingina, seta vit okkum í samband við teg

**Vilt tú práta við okkum?**

Ring til Demensklinikkina á tlf. 234587

September 2024

# DEMENSKLINIKKIN

EIRARGARÐUR 19,
TÓRSHAVN

INNGONGD YVIRAV
EIRARGARÐI 14-16

## LES UM OKKUM

Á WWW.SJUKRAHUS.FO UNDIR "DEILDIR OG AMBULATORIIR, DEMENSKLINIKKIN"

ELLA

HTTPS://WWW.SJUKRAHUS.FO/DEILDIR-OG-AMBULATORIIR-A-Z/DEILDIR-OG-AMBULATORIIR-A-Z/DEMENSKLINIKKIN